# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.06.2025 kl. 17.00

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Poul Laust Christiansen |
| | Rakul Mørk |
| | Jóhannes Liasson Rasmussen |
| | Jónfinn L. Poulsen |
| | Thorstein Thomsen (fyri Otto West) |
| Ikki møtt: | Otto West |
| | Ronni Hammer |
| | |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **102-34-2025: Umsókn um samanlegging – matr. nr. 260 og 261, Hvalba.**

Søkt verður um, at matr. nr. 260 og 261 verða løgd saman til eitt matrikulnummar.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um samanlegging.

2. **102-29-2025: Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 524d, Hvalba.**

Søkt verður byggiloyvi til afturatbygging av sethúsum og bygging av bilhúsi matr. nr. 524d.

**Tekniska nevnd 23.06.2025:**

Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi við fráviki í mun til byggistigið.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17.

3. **102-35-2025: Góðkenning av roknskapi fyri 2024.**

Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2024 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 42.383, rakstrarútreiðslur tkr. 35.187, rentustuðul og rentuútreiðslur tkr. 1.326 og løguútreiðslur tkr. 8.466. Roknskapurin gevur eitt hall á tkr. 2.596.

| | **Rakstur:** | | **Løgur:** | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.704 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 13.280 | tkr. | 0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §3. Børn og ung | tkr. | 7.089 | tkr. | 0 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 3.217 | tkr. | 2.410 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.572 | tkr. | 7 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 3.919 | tkr. | 4.614 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 3.406 | tkr. | 1.434 |
| **Íalt** | **tkr.** | **35.187** | **tkr.** | **8.465** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 10.532. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 10.662 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, nettokostnaður til eldrasamstarv er sostatt tkr. 10.300.

**Fíggjarnevndin 23.06.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna ársroknskapin fyri 2024.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

4. **102-22-2025: Skriv viðvíkjandi Suðuroyar Vinnulívsfelag.**

Søkt verður um eina byrjunarupphædd frá kommununum í Suðuroynni til stovnan av Suðuroyar Vinnulívsfelag. Upphæddin, ið søkt verður um frá Hvalbiar Kommunu, er kr. 8.000,00, ið verður latið sum limagjald til stovnan av felagnum.

**Fíggjarnevndin 28.04.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum, treytað av, at allar kommunurnar í oynni verða við.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

5. **102-31-2025: Leingjan av sáttmála um undirvísingartilfar – Nám.**

Skriv frá Nám um leingjan av verandi sáttmála um undirvísingartilfar við trimum árum fyri skúlaárini 2025/2026 til og við 2027/2028. Høvuðsbroytingin í sáttmálanum er, at 10. flokkur ikki longur er við í avtaluni vegna manglandi tilfar frá Námi til henda flokk. Kostnaðurin hjá kommununum er kr. 1.191,00/næming árliga tey næstu 3 árini umframt prístalsjavning.

**Trivnaðarnevndin 23.06.2025:**

Nevndin mælir til at leingja verandi sáttmála í 3 ár.

**Fíggjarnevndin 23.06.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við uppskotinum um leingjan av verandi sáttmála.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

6. **<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl. 18.50

Janus Thomsen

Poul Laust Christiansen

Rakul Mørk

Jónfinn L. Poulsen

Jóhannes Liasson Rasmussen

Thorstein Thomsen